# STJØRNUEYGA

*Tekstur:* *næmingar 5.a, Sankta Frans Skúli*
*Myndir:* *Sólbjørn Fríði Olsen 5.a, MáF og foreldur*
*Tekning:* *Matteus Hentze 5.a*

## Barnasjónleikarastevnan
### MáF 2007

Leygardagin 5. mei skipaði MáF - meginfelag fyri áhugasjónleikarafeløg í Føroyum - fyri barnasjónleikarastevnu í Havn.
Sjey leikir vóru á skránni, tann fyrsti byrjaði kl. 12.00 og tann seinasti kl. 17.00. Ein stuttur steðgur var millum leikirnar. Framførslurnar vórðu leiktar í Tinghúsgarðinum, í Sjónleikarhúsinum og á Meiarínum. Í foyéruni í Sjónleikarhúsinum var eisini andlitsmáling, sum tey ungu frá Dramaverkstaðnum í Havn skipaðu fyri.

## Gykl- og gleðisgonga



*Eldspýting í Tinghúsgarðinum*

Stevnan byrjaði við einari gykl- og gleðisgongu frá Sjónleikarhúsinum oman í Tinghúsgarðin.
Í Tinghúsgarðinum vóru nógvir luttakarar, og nógv fólk var komið at hyggja. Ein maður og ein kona við svørtum andliti sjongleraðu við trimum eldbóltum. So kom ein onnur svørt kona við tveimum stavum, sum logaðu í endunum. Maðurin vildi eisini hava ein stav, og so gjørdu tey ymisk kynstur, og tað var sum eldlist.

Har var eisini ymiskt annað. Gunnvá Zachariassen, stevnu samskipari, tók orðið og Hildur Eyðunsdóttir frá Tórshavnar Býráð helt eina røðu um sjónleik og setti stevnuna. Har vóru eisini tónleikararnir Dánjal, Búi, Óli og Andrias, sum vit kenna frá barnasjónleikinum Ævintýrferðin, og vit prátaðu við teir. Teir spældu á neytaklokku, rútmutrummu, stórutrummu og friend-drum og sungu eisini saman við áskoðarunum.

Kórið hjá Tórshavnar Musikkskúla við Joannu Johansen og Kára Bæk sungu eisini. Sangirnir ljóðaðu ótrúliga væl, men tað var keðiligt, at tey ikki sungu harðari og týðiligari.

*Linda Jórun Poulsen, Guðrið Hentze, Rani Dam, Hákun D. Olsen og Sissal Abrahamsen*